## 4 Kolanám

Í Hvalba vitja tey eitt kolanám. Har síggja tey ein kolavogn, ið hevur skap og mát innan sum víst á tekningini niðanfyri. Vognurin vigar 137 kg, tá ið hann er tómur.




Evnisnøgdin í koli er 1,45 tons/$m^3$






**a)** Hvussu stór er víddin á endanum á vogninum?

**b)** Hvussu stór er rúmdin á vogninum?

Ein vognur við koli í vigar 835 kg.

**c)** Hvussu nógv vigar kolið í vogninum?

**d)** Hvussu stór er rúmdin á kolinum í vogninum?

Tá ið kol verður høgt leyst, fyllir tað munandi meiri, enn tað ger, áðrenn tað varð høgt leyst.

Rúmdin á kolinum økist tá í lutfallinum 1 : 1,6

Tey høgga kol av eini kolalind. Nøgdin svarar til 5 $m^3$, áðrenn tað varð høgt leyst.

**e)** Hvussu nógvar túrar mugu tey í minsta lagi koyra út við vogninum, fyri at føra høgda kolið úr fjallinum?

## 5 Gjaldoyra

Í Hvalba verður ikki høgt so nógv kol longur. Tey ætla tí at innflyta kol úr Onglandi.
Úr Onglandi keypa tey heilar plattar av koli. Á einum platti eru 40 sekkir á 25 kg.
Prísirnir, ið tey hava fingið upplýstar, síggjast í talvuni høgrumegin (prísirnir eru í GBP).

| Plattar á 40 sekkir | Prísur pr. platt |
|---|---|
| 1 | 230 £ |
| 2 | 450 £ |
| 3 | 660 £ |

| | | |
|---|---|---|
| Kursur: | GBP, £ | 858,38 |

**a)** Hvussu nógvar krónur kostar ein sekkur, um tey bara keypa ein platt?

**b)** Hvussu nógvar krónur er hvør sekkur bíligari, um tey heldur keypa 3 plattar hvørja ferð?

**c)** Hvussu nógv prosent er ein sekkur bíligari, um tey keypa 3 plattar í senn, heldur enn ein platt hvørja ferð?

## 6 Síður og vinklar

Høgrumegin er ein fyrimynd av fýrkantinum **ABCD** teknað.

Tríkanturin **ABC** er javnbeintur.

**a)** Rokna longdina á hornalinjuni **AC**.

**b)** Rokna vinkul **A** í tríkanti **ABC**.

**c)** Rokna longdina á síðuni **BC**.

